Ítróttar
Sosialurin
Nr. 95 • hósdagur • 18. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Poul Ennigarð úti við beinbroti

**Verjuspælarin, sum í ár hevur sett seg á GÍ-miðvøllin, noyðist at halda seg burtur frá fótbólti komandi seks vikurnar**

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Talan var um hendiligt óhapp undir venjingini mánadagin, sum hevði skaðan við sær, sigur Poul sjálvur.

Læknarnir hava staðfest, at talan er um brot. Tíbetur liggur hetta hampuliga væl, soleiðis at eg sleppi undan skurði og gipsi. Men beinið er lagt í skinnara, og eg skal binda frið í seks vikur, og tað er sjálvandi einki serligt.

Higartil í ár hevur GÍ staðið seg rættiliga væl, og ivaleyst eisini betri, enn tey flestu høvdu roknað við. Eisin hjá Poul sjálvum hevur talan verið um eitt gott ár higartil. Á nýggjum plássi á sentrala miðvøllinum hevur hann átt sín stóra lut í góðu gongdini, og tað er ikki sørt, at spælarin harmast skaðan,




*Tað er dyggur smeitur hjá GÍ, at teir nú mugu vera sterka Poul Ennigarð fyriuttan í fleiri vikur. Eftir øllum at døma verður hann ikki tøkur hesumegin summarsteðgin*
*Mynd: Álvur*

sum nú sendir hann út um síðulinjuna.

Tað er sjálvandi harmiligt. Hjá liðnum hevur gingist væl, og sjálvur haldi eg, at eg nú havi vant meg við nýggja plássið, og so er tað sjálvandi stórt spell, at ein somikið drúgvur steðgur kemur í. Men sum so fái eg ikki gjørt stórt annað enn at bíða við tolni, til eg aftur sleppi ígongd, staðfestir hann.

# Til sterka íslendska kapping

**Komandi vikuskiftið verður nógv Bridge á skránni hjá føroyingum. Fýra lið kappast í Íslandi, meðan eitt lið fer til Svøríkis**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Ikki færri enn 4 lið fara at umboða Føroyar í sterku valdømiskappingini hjá Íslendska Bridge Sambandinum. Kappingin er soleiðis skipað, at hvørt valdømi sendir fýra tey sterkastu liðini at umboða seg í hesari sera sterku kapping.

Hetta er fyrstu ferð, at føroyingar luttaka í einari slíkari kapping, ið er skipað á sama hátt sum ein talvkapping fyri lið. Tað vil siga, at tey fýra liðini hjá okkum verða sett á 1,2,3, og 4 borð, alt eftir styrkið.

**Liðini, ið skulu umboða Føroyar eru:**

**Borð 1:**
Bogi Simonsen –
Hallberg Arnfríðson
Robert Langaard –
Allan Dal- Christiansen

**Borð 2:**
Marner Joensen –
Dia Jacobsen
Jákup Hjaltalin –
Arnbjørn Sivertsen

**Borð 3:**
Rói á Røgvu Joensen –
Jens Midjord
Hans Jacob Petersen –
Árant Berjastein

**Borð 4:**
Høgni Jacobsen –
Finn Ougaard
Sakaris Joensen –
Salamon Johannesen

Allir leikarinir á føroyska liðinum eru leikarar, sum vera at síggja í 1.deild komandi kappingarár.

**Rottneros Cup**

Eitt lið úr Føroyum luttekur um vikuskiftið í Rottneros Cup í Svørríki. Kappingin er einans fyri tey lið, ið eru steypavinnarar í teimum ymisku norðanlondunum. Rottneros Cup er ein av teimum sterkastu kappingunum í heila tikið. So tað verður ein sera torfør uppgáva hjá okkara monnum at loysa.

**Liðið, ið umboðar Føroyar er:**
Jóannes Mouritsen –
Heðin Mouritsen
Dánjal Pauli Mohr –
Per Kallsberg

**Til Hetlands 25 til 29 mai.**

Aftur í ár verður fari til Hetlands at spæla bridge móti hetlendingum. Hetta er tríðja árið á rað at spælt verður móti hetlendingum. Í fjør vóru ikki færri enn 32 spælarar, ið fóru við Norrøne til Leirwick.

Tað er Smyril Line, ið saman við Boga Simonsen, sum skipar fyri túrinum. Fari verður av Havnini hósdag áleið kl. 17.00 og komið verður aftur á Havnina mánamorgum kl. 06.00.

Tilmelding fer fram hjá Smyril Line.



*Hóast føroyska kappingin er liðug, so er talan framvegis um rúgvusmikla skrá hjá føroyskum bridge-spælarum*

## Føroyar hava somu kós

**Á FIFA styrkislistanum, sum varð kunngjørdur í dag, eru Føroyar niðari á listanum enn nakrantíð áður**

FIFA LISTIN
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin taptu Føroyar 4-0 í Póllandi. Um talan var um nýtt útgangsstøði, sum fer at bera betri spæl og fleiri stig og sigrar við sær, fer framtíðin at vísa.

Seinastu tíðina hevur verið langt millum sigrarnar og stigini. Tað hevur sæst aftur á FIFA styrkislistanum.

Í dag varð styrkislistin fyri mai mánað almennur. Nú eru Føroyar á 139. plássinum. Hetta er tvey pláss niðari enn fyri einum mánað síðani, og hetta er niðasta plássið, sum Føroyar nakrantíð hava verið á. Hægsta plássið fyri nøkrum árum síðani var nummar 112.

Sambært FIFA eru Maldivurnar og Swaziland nú stinnari fótbóltstjóðir enn Føroyar. Tað hava hesi londini sambært styrkislistanum ikki áður verið.

Brasil, Kekkia og Holland eru sambært síðsta listanum undan HM endaspælinum størstu favorittarnir at vinna HM. Meksiko er lopið frá 6. og til 4. plássið, og síðani er røðin USA, Spania, Portugal, Frakland, Argentina, England, Nigeria, Danmark, Italia, Turkaland, Kameroun og Svøríki. Egyptaland og Japan eru eisini frammanfyri Týskland, sum á 19. plássinum ikki kann roknast millum favorittarnar at vinna HM. Uggin hjá týskarunum er, at tað ikki er á styrkislistanum, men á vøllunum at HM verður avgjørt.

Danmark er á 11. plássinum, og danir eru harvið framvegis hægst styrkismetta fótbóltstjóðin av teimum, sum ikki eiga rætt at luttaka í HM endaspælinum. Noreg og Finland varðveita plássini sum nummar ávikavíst 40 og 49, og Ísland er farið tvey pláss eftir hæli og er nú nummar 99.

Í EM undankappingini, sum tað verður farið undir seinni í summar, eru Føroyar umfram Fraklandi og Italia í bólki við Ukreina (45), Skotlandi (59), Litava (93) og Georgia (101).